Bygdarskúlin á Sandi er frá 1884 og ikki tíðarhóskandi. Nú heitir ein bólkur av foreldrum at skúlabørnum á bygdarráðið um at raðfesta nýggjan skúla fram um ítróttarhøll

Mynd: Edvard Joensen

Vilja raðfesta skúla fremri enn ítróttarhøll

Borgarar heima á Sandi meta, at kommunan átti at raðfest skúlan í bygdini fram um ítróttarhøllina, sum í løtuni hevur fyrsta prioritet. Borgarstjórin sigur, at raðfestingin er gjørd, og fíggjarlógin er samtykt. So tað kann ikki broytast

UNDIRSKRIFTIR
Edvard Joensen

Sandi: Heima á Sandi hevur ein bólkur av foreldrum tikið stig til at savna undirskriftir til tess at vísa bygdarráðnum, at tey eru ósamd við raðfestingini hjá Sands Kommunu, sum sigur, at ítróttarhøll skal raðfestast fremri enn bygdarskúlin, har smærru børnini ganga.

Tey sum hava lagt listarnar út í handlarnar á Sandi, siga, at tey halda tað vera av størri týdningi at byggja nýggjan bygdarskúla á Sandi heldur enn ítróttrhøll.

Ein teirra, sum hevur skrivað undir áheitanina, sigur við Sosialin, at tey longu eru løgd undir at vera í móti ítróttarhøllini.

Men so er ikki, sigur undirskrivarin. Vit vilja sanniliga eisini hava ítróttarhøll, men vilja bara vísa á, at vit halda raðfestingina vera skeiva. Tað eigur eftir okkara tykki at vera skúlin, sum eigur fyrsta prioritet, og tá hann er liðugur, eigur ítróttarhøllin at koma.

Borgarstjórin á Sandi, Páll á Reynatúgvu, sigur, at bygdarráðið hevur raðfest soleiðis, og fíggjarætlanini fyri 2002 er samtykt við ítróttarhøllini á fyrsta plássi, og tað kann ikki broytast.

Men hann virðir rættin hjá teimum, sum hava aðra áskoðan enn bygdarráðið, at gera hana galdandi, leggur hann dent á.

Fáment

Páll á Reynatúgvu førir fram, at tey, sum skrivað hava undir, eru sera fáment. Og hann rør eisini fram undir, at talan kann vera um politiskt spæl.

Hann vísir á, at av teimum trimum, hann metir sum stigtakarar, eru í hvussu er tvey, sum hoyra til ávísan politiskan flokk, sum borgarstjórin ikki er limur í.

– Tað harmar meg nógv, um málið nú verður partapolitiskt litað, sigur Páll á Reynatúgvu.

Tað er gott, at fólk gera vart við, hvat tey halda um ávís mál, Tað er partur av fólkaræðinum og kann birta upp undir kjak um ymisk mál, sigur hann.

Grundin til, at hetta málið yvirhøvur er komið upp, sigur Páll á Reynatúgvu, er tann, at sitandi bygdarráð hevur verið opið og kunnað borgararnar í kommununi um tað, sum fer fram. Soleiðis at fólk eisini hava fingið at vita, at ítróttarhøllin er raðfest fram um skúlan.

– Tað er nakað heilt nýtt, sum einki bygdarráð undan hesum nakrantíð hevur gjørt, vísir hann á.

Samt bygdarráð

Tað var eitt samt bygdarráð, sum tók prinsippavgerð um at seta pening av til írtróttarhøllina, vísir Páll á Reynatúgvu á.

Arbeitt verður nú við eini samstarvsloysn við aðrar kommunur í oynni. Onkur fundur hevur verið, og nýggju fundur er avtalaður, sigur hann.

At skúlin treingir til ábøtur, er hann púra greiður yvir.

Gamli skúlin á Sandi, sum er frá 1884, er ótíðarhóskandi, og nýggjur skúli má heilt skjótt byggjast.

Men sum fíggjarstøðan hjá kommununi er nú, ber ikki til at fáa bæði høll og skúla, og tá raðfestingin nú er gjørd, verður neyðugt at fylgja henni.

Hinvegin vísir borgarstjórin á, at tey bæði málini, sum standa allarfremst hjá kommununi aftan á niðurgjalding av skuld, eru ítróttarhøllin og skúlin.

Tað er bara fíggjarligi førleikin sum ger av, nær skúlin verður bygdur.

Eingin ivi er um, at skúlin kemur, men bara ikki beint nú.

– Í ár er umleið ein millión sett av til ítróttarhøll, meðan einki er sett av til skúla. Tað er so tað, sigur Páll á Reynatúgvu, borgarstjóri á Sandi.

Hugskotið til ítróttarhøllina er annars ikki kommunalt, sigur hann, men er komið frá B71, sum eisini hevur søkt Undirvísingar- og Mentmálastýrið um stuðul til bygging av høllini.

Sands Kommuna hevur í ár sett 200.000,- krónur av til víðkan av barnaansingini, soleiðis at 10 ansingarpláss verða tøk afturat. Eisini hevur Sands Kommuna eina útstykking á veg.

Sands bygd er í vøkstri. Í fjør komu umleið 50 fólk afturat í komununa, og fólkatalið fór fyri fyrstu ferð í nógv ár upp um 600.

Samlaða skuldin hjá kommununi er 35 milliónir, sum er knappar tríggjar álíkningar.

Miðað verður í móti, við verandi gongd, at gjalda skuldina niður komandi 10 árini, sigur Páll á Reynatúgvu, borgarstjóri á Sandi.

hygg & hoyr

Frá fríggjadegi 18. januar til hósdagin 24. januar

Fres

So er barnasendingin Fres aftur á skrínni. Angela fær vitjan í studio av Olgar. Og Olgar er avgjørt ikki sum fólk flest, men hann er tó fittur allíkavel

Tómgongd



Lydia Didriksen ummælir:

Januar er myrkur og langur og illfýsin, og møng munnu kenna hann serliga tungan at koma ígjøgnum. Handlarnir royna at lokka kundarnar inn í ljósið við bíligum tilboðum og útsølum, men tey flestu munnu enn kenna sviðan í lummunum eftir høgtíðina.

Tað er eins og alt koyrir í tómgongd, meðan bíðað verður eftir várinum og betri veðri. Og loftmiðlarnir eru ikki undantøk í so máta. Tónleikurin sjengrar úr lurtinum frá tíðliga á morgni til seint á kvøldið. Treyðugt so okkurt hugvekjandi innslag hevur verið síðstu vikuna t.d. tað um amerikanska forsetan og saltstongina, sum fór tvørt fyri, meðan hann hugdi eftir einum spenningsfilmi … ella hvussu var tað nú, tað var?! Tað krevur serligt hugflog og hegni at borðreiða slík tíðindi!

Nú skal rætt vera rætt! Summar tónleikasendingar eru serligar. Eg havi altíð lurtað eftir Sugguni hjá Gissuri, og helst eru tey fleiri við mær, sum gingu í diskotek í sjeyti-árunum, sum fegnast um júst hesa sendingina. Ofta eru góð løg at hoyra, sum ein ikki hevur hoyrt í fleiri ár, men minnist frá dansigólvinum í Klubbanum.

Onnur áhugaverd tónleikasending er Á sanganna veingjum hjá Gunvør Poulsen. Eisini úrvalið í hesum sendingunum fær meg at steðga á og lurta. Og sum ta triðju og síðstu tónleiksendingina fari eg at nevna Partita, sum nýliga er komin undan kavi, og sum eg fegnist um og lurti eftir við gleði og áhuga.

Aðrar góðar tónleikasendingar eru eisini, hóast eg ikki havi nevnt tær her, men spurningurin er, um dagliga útboðið av sendingum í ÚF er fjøltáttað ella einstáttað, er viðkomandi ella einkisigandi ella…!

Tað tykir mær, sum um tey somu evnini verða tandlað og tugd upp í saman dag og dagliga viku eftir viku. Hugsa bara um tíðindi og sendingar um olju, fíggjarviðurskifti og búskap, fiskivinnu, orku, vegakerv og flutningsmøguleikar, vinnulív, politikk og so frameftir. Áhugavert? Serstakliga áhugavert og viðkomandi fyri okkum øll! Hetta eru evni, sum skapa karmarnar um okkara gerandislív og hava avgerandi ávirkan á okkara lívstreytir, okkara møguleikar og okkara hugburð.

Men annað enn karmar eru tað so ikki! Verri er statt við sendingum, sum viðgera fylgjur, árin og avleiðingar av kørmunum fyri vanliga føroyingin. Og tað undrar meg stórliga, tí tilfarið skuldi verið rúgvismikið og áhugavert. Eg ivist ikki í, at sendingar, ið viðgjørdu eitt nú arbeiðslív, familjulív, korini hjá børnum og ungum, sosial viðurskifti, mentan og skúlaskap, lívsvirði og broytingar høvdu gjørt ÚF meiri fjøltáttað og viðkomandi at lurta eftir.

Raðfestingin í ÚF tykist so grunn og tilvildarlig, og fær ein at spyrja, um nøkur raðfesting er yvirhøvur. Senditíðin er so long sum ongantíð áður, men dygdin er heldur enn ikki ivasom!

Tað er sum um Bør Børson og bankandi rútmur eru nóg mikið av oyrakrási smurt eitt sindur við olju og krúddað við tvørum saltstengrum! So kann man altíð práta eitt sindur við onkran um okkurt!

Miss Galaxy – í Føroyum

Okkara køkur

Trý korter við Bella Jóhann

Leygarkvøld í Lindini

Leygarkvøld í Lindini